*Framhald av síðu 23*

partaeigarum skattalætta enn økja tær almennu útreiðslurnar.

Í Bretlandi hevði Arbeiðaraflokkurin tapt fýra fylgjandi parlamentsval. Flokkurin skifti kós og tók undir við liberalum marknaðarbúskapi. Longu í 80-árunum tók Tony Blair undir við konservativa fíggjarmálaráðharranum Nigel Lawson, tá hann gjørdi rammur fyri vinnulívið at virka undir. Labour fór at ansa væl eftir útreiðslunum og fáa tamarhald á inflasjónini, segði Tony Blair longu tá. Grein 4 í viðtøkunum hjá Labour varð strikað – tað var paragraffin, sum segði, at Arbeiðaraflokkurin skuldi virka fyri, at tað almenna skuldi eiga framleiðslutólini.

Bæði í New Zealandi og Avstralia vóru tað arbeiðarastjórnir, sum stóðu fyri avtøkuni av sosialdemokratisku skipanini og teir fyrstu at fremja nýliberala umskipan.

Ongin skipan hevur roynst líka væl sum fríu marknaðarkreftirnar, tá tað ræður um at skapa ríkidømi. Í hesi verðini trívist tann gamla sundurbýtingin millum høgra og vinstra ikki. Tony Blair hevur fleiri ferðir tosað um at flyta orðaskiftið tvørtur um tey gomlu mørkini millum høgra og vinstra. Bill Clinton fordømdi teir heiladeyðu høgra- og vinstraflokkarnar. Í dag eru bæði republikanarar og demokratar í USA fyri fríhandli, og hvørgin flokkur vil hækka skattin ella tær almennu útreiðslurnar.

Anglo-amerikanska skipanin hevur eisini fingið fótafesti í teimum fyrrverandi kommunistalondunum eystanfyri, sum halda, at marknaðarbúskapur er ein fyritreyt fyri vælferð. Tað sama er í Suðurafrika, har ANC annars hevði øktan skatt til sosiala vælferð á skránni.

Tað er bara í Asia, pørtum av Latínamerika og Evropa, at politikarar dvála við at hálsfevna ta nýggju skipanina. Asiatiskar stjórnir hildu fram við at fremja búskaparlig tiltøk gjøgnum nítiárini. Tey, sum vóru fyri fríhandli, søgdu, at hetta var orsøkin til, at ein stór fíggjarkreppa rakti Asia fyri nøkrum árum síðani. Stuðul til londini hevur síðani verið treytaður av, at tey skipaðu búskapin eftir amerikanskari fyrimynd, og ikki hevur verið hugsað um, at hesi londini líkjast als ikki Amerika. Tey hava heilt aðrar mentanir, menningarstøði, stovnar og ein heilt annan tørv. Í Latínamerika hava nývaldir forsetar í Brasilia, Venezuela, Argentina og Ecuador lovað veljarunum ein heilt annan vælferðarpolitikk enn tann, amerikanarar bjóða.



*Á heysti í 1988 helt Gorbatjov røðu í ST og segði, at kalda kríggið var av. Árið eftir fall Berlinmúrurin, og trý ár eftir taluna hoknaði Sovjetsamveldið saman*

Fyrilitarloysið við anglo-amerikansku skipanini fekk ongantíð rættiligt fótafesti á evropeiska meginlandinum, har politikararnir framvegis vilja varðveita samhaldsfastar skipanir, vælferðarsamfeløg og búskaparligt samstarv, og at búskapurin skal regulerast til samfelagsins besta. Tey rokna Bretland sum ein trojanskan hest, ið dregur amerikanskú business-hugsjónina inn í Evropa. Kortini hevur ekkin um vaksandi tal av eldri í samfeløgunum, stórt arbeiðsloysi og evrusamstarvið gjørt, at eisini evropeiskir sosialistar hava kent seg noyddar at fremja politisk tiltøk, sum áður høvdu verið roknað sum trúarvilla. Pensjónsaldurin hjá fólki í almennum starvi er hækkaður í Týsklandi, Grikkalandi, Italia og Finnlandi, og eftirlønin er lækkað. Í Fraklandi og fleiri øðrum londum eru arbeiðsloysisskipanirnar broyttar, so tær ikki skula eggja fólki til at lata vera við at royna at fáa arbeiði.

Flestu evropeisku londini halda nú, at sosiala skipanin má broytast, skal kappingarførið økjast. Londini hava gjørt arbeiðs- og kapitalmarknaðin fríari, lækkað skattin og krympað vælferðarstatin, so at tey skula vera meira lokkandi hjá altjóða stórfyritøkunum, sum flyta í heilum. Í endanum á túsundárinum framdu griksku sosialistarnir beinharðar niðurskurðir, so at Grikkaland kundi verða við í evrusamstarvinum. Og franskir sosialistar høvdu privatiserað fleiri vinnufeløg enn høgrastjórnin frammanundan. Á evropeiska meginlandinum er tað týski kanslarin Gerhard Schröder, sum er mest fúsur at fylgja enskaamerikanska politikkinum til høgru. Líka síðan hann varð valdur í 1998, hevur hann veitt bæði vinnuni og borgarunum skattalættar. Hann hevur eisini skorið tær almennu útreiðslurnar niður og roynt at lækka eftirlønina og at skerja aðrar vælferðargóðgripir.

## Búskaparvøksturin hevur verið stórur

Samstundis sum hugsjónirnar hava borið saman, er heimurin krympaður. Liberaliseringin av altjóða fíggjarøkinum hevur havt við sær, at kapitalur streymar um allan heim. Tøknifrøðin innan samskifti hevur hjálpt væl til hesa gongd. Í 1930 kostaði tað 300 dollarar, rokna í 1996-dollarum, at tosa í telefon í 3 minuttir millum New York og London. Nú kostar tað minni enn ein hálvan dollara. Prísurin á datumegi er fallin í miðal 30% um árið 10 tey seinastu árini. Miljardir av dollarum verða nú fluttir um allan heim eftir fáum sekundum, alt samdøgrið. Íleggjarar, partabræva- og pensjónsgrunnar spjaða váðan við at flyta peningin úr einum landi í annað.

Tær stóru fyritøkurnar himprast ikki við at býta sítt virksemið sundur, so at framleiðslan verður sniðskapað í einum landi, komponentar verða gjørdir í einum øðrum landi osfr. Alt verður gjørt, har arbeiðsmegin er bíligast, skattafyrimunirnir størstir og rávøran bíligast. Tá td General Electric vildi fremja kostnaðarsparing á sínum tólum, turbinum og jettmotorum, bóðu teir amerikansku undirleverandørarnar flyta til Meksiko ella onkra aðrastaðni, har arbeiðsmegin var bíligari. Annars fóru teir at finna sær aðrar undirleverandørar. Sjálvt fyritøkur, sum hava verið rótfestar í heimlandinum, flyta nú framleiðslu og umsiting úr móðurlandinum fyri at minka um útreiðslurnar.

300 fleirtjóða fyritøkur eiga nú 25% av øllum kapitali í heiminum. Einans 21 lond hava størri bruttotjóðarframleiðslu enn 6 tær størstu fleirlanda fyritøkurnar. Teirra árligi umsetningur liggur millum 111 og 126 miljardir dollarar. Sølan hjá hesum fyritøkum er tveir triðingar av heimshandlinum, og tær eiga ein triðing av úrtøkuni.

Fyritøkurnar gera íløgur um allan heim. Beinleiðis útlendskar íløgur vóru 60 miljardir dollarar í 1980. Í 2001 vóru tær 700 miljardir dollarar. Í menningarlondunum eru útlendsku íløgurnar øktar úr 2,3 miljardum dollarum fyrst í sjeytiárunum til 80 miljardir í tíðarskeiðinum 1991-96.

Vørurnar hjá stórfyritøkunum eru kendar um allan heim. Coca-Cola er so gott, at tað hoyrir við til hvørt brúdleyp í India, og búmerkið hjá Pepsi, sum er hvítt, reytt og blátt, er kendari enn Union Jack.

Altjóðaagerðin hevur givið okkum eina yvirflóð av valmøguleikum, og vøksturin í materiellu vælferðini hevur ikki sæð sín líka, ikki einans í ídnaðarlondunum, men eisini í londum, sum vóru armóðslond, tá seinni heimsbardagi endaði.

Í USA hevði búskaparvøksturin staðið við so leingi sum ongantíð fyrr, tá vit fóru um aldaskiftið. Arbeiðsloysið var tað lægsta í 30 ár, og fyri fyrstu ferð í 42 ár var hampiliga stórt yvirskot á fíggjarlógini. Amerikanskar stórfyritøkur høvdu óvanliga stóran vøkstur í nítiárunum, og stjórnarnir fingu góða samsýning afturfyri. Nevnast kann, at inntøkan hjá stjórnanum í Disney var 576 miljónir dollarar í 2001. Tað svarar umleið til bruttotjóðarframleiðsluna á Seychellunum.

Í 1980 átti stívliga helvtin av bretum sína egnu íbúð ella hús. Talið var økt til tveir triðingar, tá Thatchertíðarskeiðið endaði. Fýra av fimm húsarhaldum í Bretlandi eiga sjónbandaupptakara og 34% teldu – hetta seinasta talið nærum tvífaldaðist eftir tveimum árum. 60% av fólkinum halda seg nú hoyra til miðalstættina. Bretar brúka í dag meira pengar uppá frítíðarítriv enn mat, býli og klæði.

Í New Zealandi hevur búskaparvøksturin verið 4% í miðal síðani 1992, og arbeiðsloysið er minkað niður í helvt til 6%. Avstralia hevur ein tann størsta búskaparvøksturin í heiminum, og Kili hevði í 10-ára skeiðinum frá 1988 ein búskaparvøkstur uppá 7% í miðal. Teiland hevur trífaldað bruttotjóðarframleiðsluna pr íbúgva síðan 1975, tá bara eitt av 6 fólkum úti á bygd kundi fáa reint drekkivatn. Í dag kunna 4 av 5 fáa reint vatn.

India stríddist ímóti útlendskum íløgum og liberalisering, men hevur verið lagaligari tey seinastu árini, og búskapurin blómar. Bilasølan øktist 57% nýggju teir fyrstu mánaðirnar í 2000, og indiskir telduserfrøðingar seldu forrit fyri 4 miljardir dollarar í 2000. Og so ikki at gloyma Kina, sum hevur havt eina búskaparliga framgongd sum kanska einki annað land, síðani lagt varð um frá planbúskapi til marknaðarbúskap.

## Hvat er prísurin?

Noreena Hertz skrivar:

*"Lat-standa-til-kapitalisman tykist at hava sigrað. Tað tykist, sum var tað rætt val at lata marknaðin stýra búskapinum. Alt sær frálíkt út. Við fyrsta eygnabragdi, væl at merkja. Men, sum sagt verður, einki er ókeypis? So – hvat er prísurin, vit noyðast at gjalda?"*.

4. desember 1998 vitjaði Charles prinsur av Bretlandi London-skrivstovuna hjá Big Issue, sum er eitt vikublað, sum fólk, ið eru niðurundirkomin, selja fyri at vinna nakrar krónur. Har møtti hann tí heimleysa Clive Harold, sum seldi á gøtuni. Hann loypti hvøkk bæði á prinsin og fjølmiðlarnar, tá hann bjóðaði Charles vælkomnum við orðunum: *"Minnist tú meg?"*

Harold hevði jólamanshúgvu á høvdinum og var í einum tjúkkum frakka, mestsum á holi. Hann minti



*Longu í 80-árunum tók Tony Blair undir við konservativa fíggjarmálaráðharranum. Her sæst Blair á fundi við týska kanslaran, Gerhard Schröder, sum hevur verið fúsur at fylgt enskt-amerikanska høgrapolitikkinum*